## Heimsmeistararnir taptu

Roberto Donadoni fekk ikki nakran sigur, tá hann fyrstu ferð stóð á odda fyri italsku heimsmeistarunum. Mótstøðuliðið var Kroatia, og á heimavølli eydnaðist teimum at basa Italia. Endaliga úrslitið gjørdist 2-0, og vórðu bæði málini skotin fyri steðgin. Málskjúttar hjá Kroatia vóru Eduardo da Silva og Luka Modric.

-mørk



## Belgia skelkað

Bara tveir aðrir undankappingardystir vórðu spældir í Europa í gjárkvøldi. Mest óvæntaða úrslitið var, at Belgia á heimavølli mátti taka til takkar við 0-0 javnleiki móti Kazakhstan. Hin dysturin var í Estlandi, har Makedonia vann tepran 1-0 sigur á Estlandi. Í aðrar mátar var talan um hópin av venjingardystum, áðrenn veruligur skjøtul verður settur á undankappikngina um tvær vikur. 2. september eru ikki færri enn 19 dystir á skránni. Teirra millum tann hjá Føroyum í Skotlandi.

-mørk

# læra

### Lærutíðin er ikki av

»Vit eru við fyri at læra« var ævigi sannleikin, sum føroyska fótbóltslandsliðið livdi eftir fyrstu árini.

Tann lærutíðin hevði sum so eisini ætlaðu effektina. So hvørt, sum spælararnir fingu fleiri altjóða royndir, búnaðust teir eisini til stóru uppgávurnar, og tó at stigini aloftast hava restað, so hava góðu avrikini verið rættiliga nógv í tali.

Tað er kanska nærliggjandi at spyrja, hvørt lærutíðin byrjar av nýggjum, nú somikið stórar útskiftingar hava verið á liðnum. At skaðar samstundis hava sett tríggjar lyklaspælarar uttan fyri gjørdi sjálvandi ikki føroysku kortini betri, og tað kann so væl vera, at úrslitið hevði verið betri, um Jón Rói, Súni og Ingi vóru á liðnum. Hinvegin, so er lítil nytta í at hugsa um teir spælarar, sum ikki vóru tøkir. Og skulu vit hava avloysarar við royndum, so er bara ein máti at fáa hesar. Dystir skulu til, og tað er fyrst og fremst í dystum sum tí mikukvøldið, at lærupeningurin fæst til vega. Bæði soleiðis at mistøkini kunnu minimerast, og soleiðis at liðið í størri mun lærir at standa rætt. Nakað sum kundi forðað fyri onkrum av teimum kontra-álopum, sum endaðu í føroyska málinum.

Boðini frá landsliðsvenjaranum undan dystinum – og eftir dystin eisini frá liðskiparanum – eru tó greið. Gevið liðnum tíð at mennast. Og hóast hvørgin teirra tosar um »við fyri at læra«, so benda útsagnirnar avgjørt tann vegin.

### Georgia er sterkt

Tað var tó ikki bara tað, at Føroyar ikki spældu sín besta dyst mikukvøldið. Georgia var í fleiri mátar nakað væl sterkari, enn flestu føroyingar høvdu roknað við.

Hóast truplu umstøðurnar á rennváta og bleyta vøllinum, so megnaðu mótstøðumenn okkara fleiri ferðir at flyta bóltin skjótt runt við fyrstuferðs sendingum. Og bæði sendingar og rennibanar í kontrafasuni vóru ein fragd at síggja, hóast tað sveið í føroyska fótbóltshjartanum.

Tí var málið kanska sett ov høgt, tá tað varð staðfest, at besti møguleiki okkara fyri stigum var júst hesin dysturin. Tað er neyvan nakar, sum roknar við teirri heilt stóru sensatiónini móti Italia og Fraklandi. Litava hevur áður víst, at teirra fótbóltur als ikki hóskar til føroyska landsliðið, so kanska er besta vónin í so máta Skotland. Teir hava eisini áður víst, at teir avgjørt eru til at tosa við hjá føroyska liðnum, og við dystinum í Glasgow mest sum beint handan hornið, skulu føroysku spælararnir kanska síggja júst tann dystin sum stóra møguleikan.

At talan so í fyrstu syftu er um dyst á útivølli, ger á ongan hátt uppgávuna léttari. Men hópatals ferðir hava vit sæð, at okkara menn er menn fyri at reisa seg, júst sum størstu lúsingarnir eru fingnir.

Kanska ikki við kravi um sigur, men um eitt avrik, sum enn einaferð kann prógva, at Føroyar ikki eru nøkur walk-over í altjóða fótbóltsspælinum.



*Talan hevur verið um stórar umskiftingar í landsliðshópinum. Eitt nú var Janus M. Joensen á vøllinum í samfullar 90 minuttir mikukvøldið*

*Mynd: Álvur*

## FAKTA UM DYSTIN

### EM-undankappingar-dystur á Svangaskarði

2.114 áskoðarar

**Føroyar-Georgia 0-6 (0-6)**
0-1: Jaba Kankava, 16.
0-2: Alexander Iashvili, 18.
0-3: Shota Arveladze, 36.
0-4: Levan Kobiashvili (pen), 49.
0-5: Shota Arveladze, 59.
0-6: Shota Arveladze, 80.

**Referees:** Michael Thomas Ross (dómari), David Redfern and David Todd (hjálpardómarar) David Malcolm (4. dómari) Allir úr Norðurírlandi

**Føroyar:** 1. Jákup Mikkkesen – 9. Jákup á Borg – 13. Óli Johannesen – 4. Atli Danielsen – 3. Janus M. Joensen – 10. Christian Høgni Jacobsen – 5. Claus Bech Jørgensen – (2. Pauli G. Hansen, 46.) – 12. Kári Nielsen – 7. Fróði Benjaminsen – 8. Símun Samuelsen – (14. Hans Pauli Samuelsen, 58.) – 6. Rógvi Jacobsen – (11. Jónhard Frederiksberg, 69.)

**Gult kort:** Rógvi Jacobsen, Óli Johannesen

**Á beinkinum uttan at koma inn:** 15. Hanus Thorleifsson, 16. Meinhardt Joensen, 17. Bárður Olsen, 18. Vagnur M. Mortensen

**Venjari:** Jogvan Martin Olsen

**Hjálparvenjari:** John Petersen

**Georgia:** 34. Grigol Chanturia – 6. Kakhaber Aladashvili – (8. Giorgi Gakhokidze, 69.) – 37. Giorge Shashiashvili – 16. Malkhaz Asatiani – 35. Ilia Kandelaki – (5. Dato Kvirkvelia, 65.) – 14. Gogita Gogua – (Giorge Demetradze, 55.) – 22. Jaba Kankava – 10. Levan Kobiashvili – 9. Alexander Iashvili – 20. David Mudjiri – 11. Shota Arveladze

**Á beinkinum uttan at koma inn:** 1. Giorgi Lomaia – 18. Zurab Mentishashvili – 23. Lasha Salukvadze – 24. Zurab Ionanidze

**Venjari:** Klaus Toppmoller

**Hjálparvenjari:** Ralf Minge